VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Gul til stívt andøvsgul av suðri og regn. Seinnapartin lot til landøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 13 og 16 stig.



Veðrið leygardagin:
Lot til andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 14 og 17 stig.



Veðrið sunnudagin:
Fyrrapartin lot til andøvsgul av suðri og eitt skifti regn, seinnapartin gul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 13 og 16 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og mánadagin yvirhøvur turt og sólglottar, men týsdagin ælingur. Hitin millum 11 og 15 stig.

Omman ger balladu

Tann garvilla Trølla-omman verður við á Summar Festivalinum, men fyrireikararnir stúra fyri, at hon skal gera balladu, og tí hava teir sent boð eftir Føroya bestu politistum. Teir snildu Erling og Jógvan skulu syrgja fyri, at Trølla-Omman skikkar sær væl á festivalinum

Leygardagurin á Summar Festivalinum byrjar við einum rimmar barnashowi. Trølla-Pætur, Trølla-omman, Angela og Hannibal fara at undirhalda við tónleiki og øðrum góðum, og tað verður ikki spart upp á krútið.

Fyrireikararnir av Summar Festivalinum stúra tó eitt sindur fyri, at Trølla-omman skal fara at gera balladu aftur í ár, og tí hava teir sent boð eftir teimum snildastu og bestu løgreglumonnunum í Føroyum, Erling og Jógvan.

Ikki minst Erling politistur hevur drúgvar royndir í at ansa eftir Trølla-ommuni, og hann hevur lovað fyrireikarunum, at hann skal nokk syrgja fyri, at Trølla-omman skikkar sær væl.

Trølla-Pætur og Trølla-omman fara at framføra sangir á tí stóra pallinum, og á skránni verða bæði kendir og nýggir sangir. Eisini Erling og Jógvan fara at sleppa fram at mikrofonini.

Verður veðrið til vildar verður eitt stórt luftshow eisini partur av barnashowinum á Summar Festivalinum, men tað verður einki avdúkað um tað nú, tí Trølla-omman skal einki vita um tað. Fær hon frænir av tyrlum ella flúgvarum, so verður tað reint rumbul, tað er púra vist…

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	7
Nuuk	4
Qaqortoq	9
Ammassalik	9
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	10
Seyðisfjørður	11
Tórshavn	--
Lerwick	13
Aberdeen	12
London	17
Tromsø	22
Bergen	13
Oslo	--
Stokkhólm	26
Keypmannah.	21
Helsinki	18
Moskva	18
Berlin	13
Warzawa	25
Kiev	23
Bukarest	24
Paris	19
Madrid	32
Róm	26
Malorca	26
Athen	29
Malta	27
Tunis	29
Beijing	33
New Dehli	26
Bangkok	32
Jakarta	29
Sydney	17
New York	26
Miami	31
Los Angeles	21
Meksikobýur	22
Panama	30
La Paz	11
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	10

LUFTTRÝSTIÐ

Í gjár:
Eitt lágtrýst, 999 hPa. við Hvarvið fer í landnyrðing og brúgvalagið sunnan fyri Ísland verður yvir Føroyum fríggjanáttina.

Í dag:
Lágtrýstið yvir Grønlandsfjørðinum fer norðureftir og brúgvalagið til Føroya fer eystureftir.

I EINUM SAMFELAG
HAR TEY VEIKASTU
HAVA TAÐ GOTT,
HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 6/7 kl. 06⁰⁰– 7/7. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,0°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 25,6°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 6/6 kl. 06⁰⁰– 7/7 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 25,7 mm

Sosialurin

VESTFALLSKYRRINDI

5. juli	Jørðin longst frá sólini
6. juli	Tendring
8. juli	Mánin longst frá jørðini
14. juli	Fyrra kvarter

Kelda: Almanakkin 2005

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmanna-sundi fp.	sp.	Mykines-firði fp.	sp.	Nólsoyar-firði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvanna-sundi fp.	sp.	Fugloyar-firði fp.	sp.
8. Juli	09.07	21.30	08.07	20.30	08.22	20.45	11.07	23.30	-	12.07	07.22	19.45	06.22	18.45	09.22	21.45	10.22	22.45	08.52	21.15	10.07	22.30
9. Juli	09.49	22.09	08.49	21.09	09.04	21.24	11.49	-	00.30	12.49	08.04	20.24	07.04	19.24	10.04	22.24	11.04	23.24	09.34	21.54	10.49	23.09
10. Juli	10.27	22.46	09.27	21.46	09.42	22.01	00.09	12.27	01.09	13.27	08.42	21.01	07.42	20.01	10.42	23.01	11.42	-	10.12	22.31	11.27	23.46
11. Juli	11.03	23.20	10.03	22.20	10.18	22.35	00.46	13.03	01.46	14.03	09.18	21.35	08.18	20.35	11.18	23.35	00.01	12.18	10.48	23.05	-	12.03
12. Juli	11.37	23.55	10.37	22.55	10.52	23.10	01.20	13.37	02.20	14.37	09.52	22.20	08.52	21.20	11.52	-	00.35	12.52	11.22	23.40	00.20	12.37

5 707265 100050 >